# Danir fáa heitt summar

Danska veðurstovan, Dansk Meteorologisk Institut, væntar, at komandi summar verður metheitt.

- Vit rokna við, at juni, juli og august mánaði verða 0,7 stig heitari enn vanligt, sigur veðurgranskarin, Bo Christiansen, á veðurstovuni DMI við TV2.

Hann leggur afturat, at tey seinastu árini hava verið tey heitastu í, síðani mátingarnar byrjaðu fyri 150 árum síðani.

- Vit eru á eini hitabylgju. Tey seinastu tíggju árini hava vit havt lýggjan vetur og heitt summar, sigur Bo Christiansen.



*Bo Christiansen, veðurgranskari á DMI, sigur, at danir kunnu vænta eitt enn heitari summar í ár, enn undanfarin ár*



















